DAGSINS MEINING

Politikkarar óttast vælvirkandi fjølmiðlar

Krossmessudagur var altjóða dagur fyri pressufrælsi. Í Føroyum er støðan og endamálið hjá fjølmiðlunum umrødd nakað í seinastuni. Serliga í kjararvørrinum frá bókini Skjót journalistin, sum hevði við sær, at vit fingu ettí løgtingsval í ótíð. Men orðaskiftið fjaraði, uttan at nýggir marknasteinar vórðu settir.

Í einum fólkaræðiligum landi er endamálið hjá fjølmiðlunum eisini at hava eitt vakið eygað við teimum, sum hava valdið. Tá tey gera nakað, sum ikki er rætt, ella tilvitað seta sannleikan til viks, eiga tey at ábyrgjast gerðir sínar.

Treytin fyri, at fjølmiðlar kunnu fremja endamál sítt í verki, er frælsi - frælsi frá teimum, sum hava valdið, frælsi frá kapitalinum og frælsi frá politiskum flokkum, tí trúvirðið er grundarlagið undir tíðindaflutninginum í bæði í teimum prentaðu og í teimum elektronisku fjølmiðlunum.

Við grundarlagi í trúvirðinum varð leikluturin hjá amerikanskum fjølmiðlum nógv umøddur í útlendskum fjølmiðlum á "pressufrælsisdegnum". Serliga kriggið í Írak, og tað, sum ikki kemur fram til amerikanska almenningin, tí amerikanskir fjølmiðlar tilvitað offra sannleikan. Nógv av tí, vit sóu í ymiskum sjónvarpsrásum, varð ikki vístí amerikanskum fjølmiðlum, sum tóktust fjala misgerðirnar hjá amerikanskum hermonnum í Írak.

Tað er kortini ikki neyðugt hjá okkum at leita handan hav fyri at umrøða støðuna hjá fjølmiðlunum, sum skulu vera grundstólpar undir fólkaræðinum. Vit kunnu neyvan siga, at føroyskir fjølmiðlar tilvitað fjala sannleikar. Støðan er meira hon, at føroyskir fjølmiðlar hava ikki neyðuga orku og umstøður at viðgera samfelagslig viðurskifti til fulnar.

Tí fara hendingar fram, sum ikki síggja dagsins ljós. Fjølmiðlarnir røkka ikki nóg langt, og føroyska samfelagið er ikki so gjøgnumskygt, sum eitt fólkaræði eigur at vera. Bara trupulleikin at fáa alment inntlit hjá ráðum og stovnum eru dømi um tað.

Men henda støða tykist ikki órógva føroyskar politikkarar. Tvørturímóti tykist myndugleikin vera tigandi samdur um, at fjølmiðlarnir ikki skulu hava tær arbeiðsumstøður, sum teir í framkomnum fólkaræðiligum landi eiga at hava, um teir skulu røkka endamálinum at hava eitt vakið eygað við teimum, sum sita við valdinum umframt at liva upp til sínar public service skyldur. Allir miðlar her á landi hava stóran týdning fyri varðveitan av mentan og identiteti og fyri einum mennandi orðaskifti, undir ábyrgd.

Av ótta fyri góðum og vælvirkandi fjølmiðlum, sum hava orku og umstøður at kanna og viðgera skeivleikar, órættvísi og meira og minni duldar framferðir í føroyska samfelagnum, tykist at vera tigandi semja millum politikkarar um, at bløðini skulu ikki hava stuðul til útbering og at hvørki sjónvarp ella útvarp skulu hava játtan til rakstur, so fjølmiðlarnir kunnu menna seg meira og hava ein betri tíðindaflutning.

Sjálvandi skulu fjølmiðlafólk taka íegnan barm og gera sítt til, at miðlarnir eru so góðir og álitandi sum tilber. Men nú pressufrælsisdagurin fór aftur um bak, kunnu vit seta spurnartekin við, um politikararnir hava áhuga í ella tora at hava eina sterka og frælsa pressu í Føroyum! Komandi figgjarlóg er merkt av andstøðu móti bæði loft- og skrivandi miðlum. Slíkt tænir hvørki okkara demokratii ella samfelagnum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Super túrur

Sóleyð Hansen

Eg var ein av teimum ungu, sum vóru við Norønnu á ungdómstúrinum í vikuskiftinum. Haldi hetta var ein sera sera góður túrur, og eg vil hervið nýta høvi at takka Smyril Line fyri túrin.

Eisini haldi eg, at fólkini sum arbeiddu umbord tvs kantinufólk, barrvørar, fólk sum arbeiddu við kunningardiskin og vaktirnir umborð vóru sera vinarlig og gjørdu eitt gott arbeiði. At arbeiða umborð á einum skipi, har flestu ferðafólkini eru ungfólk ímillum 15 til 25 ár, sum eru komin umborð at ballast, er ikki bara sum at siga tað.

Tað er eingin loyna, at nógv alkohol bleiv drukkið á túrinum. Nøkur blivu enntá so full, at tey máttu í brummuna umborð at sova rúsin av sær. Tó haldi eg, at vaktirnir og starvsfólkini á Norrønu allatíðina høvdu tamarhald á støðuni umborð. Sambart fjølmiðlunum vóru fleiri bardagar á túrinum, men eg má siga, at eg hvørki sá ella hoyrdi nakra keðiliga hending, so hvussu nógv hald er í hesum bardaga søgunum veit eg ikki.

Summi høvdu gott nokk hug at føla seg í so nógv sum heima, við tað, at tað bleiv bæði ballast og roykt inni á kømrunum og á couchettu plássunum. Fólk fingu klárt at vita, at tey ikki skuldu gera hetta, men tíanverri bleiv tað ikki lurtað eftir boðunum. Úrslitið bleiv sjálvandi tað, at fleiri av kømrunum og couchettu plássunum vóru sera skitin.

Norrøna var avgjørt ikki ein vøkur sjón hjá ferðafólkunum, sum komu umborð í Hanstholm. Eg tosaði við onkran av teimum, og tey hildu at skipið var virkuliga skitið meini enntá orðið ólekkurt bleiv brúkt. Tó vil eg her siga, at eg ikki oftani sá fólk ganga og gera reint umborð á skipinum. Manglaðu vit handklæðir ella wc pappír inni á kømrunum, máttu vit sjálvi til kunningardiskin at spyrja eftir hesum. Gongsfólk vóru mær vitandi ikki inni á kømrunum. Hendan tænastan haldi eg kundi verið eitt sindur betri. Annars havi eg avgjørt ikki nakað annað negativt at siga um tænastuna, sum vit fingu umborð. Hon var góð.

Hýrurin á fólki var sera góður allan túrin, og eg eri vís í, at skipar Smyril Line fyri einum líknandi túri aftur, verða tað nógv fólk, sum fara at bíleggja sær ein ferðaseðil.

Tað er sjálvandi spell at skipið bleiv so illa dálkað. Skuldi Smyril Line skipa fyri einum líknandi túri aftur, kundu teir kanska hækka aldursmarkið á fólki, sum sleppa við og havt fleiri vaktir umborð. Tað hevði kanska hjálpt.

Á Sandsvatni, Leynavatni o.ø.

Jørleif Kúrberg
silaveiðifiskari m.a.

Snøggur faldari frá Ferðaráðnum um fiskimøguleikar í Føroyum.

Ferðaráð Føroya gevur út faldara, har bæði fremmandafólk og føroyingar kunnu leita sær kunnleika um fiskimøguleikarnar kring um í Føroyum.

Faldarin er sjálvandi mest ætlaður fremmandi fólki, men einki at ivast í, at onkur »innføddur« eisini fær hug at royna okkurt av tí,ið nomið verður við í faldaranum. Eg var t.d. fyrstu ferð á Ryskivatni í Suðuroy í fjør. Ein sonn perla og løtt at koma til!

Í faldaranum fær ein at vita:

- Hvar møguleikar eru at fiska.
- Hvørji fiskasløg fáast ymsu støðini.
- Hvørjar flugur ella blinkar/spinnarar o.s.fr. kunnu nýtast.

Upplýsingarnar um, hvar til ber at vassa og ikki, eru eisni hentar.

Flestu av føroysku vøtnunum eru ikki størri enn so, at skjótt er at finna útav, hvar á vøtnunum møguleikarnir eru bestir, men hetta kundi staðið í faldaranum.

Eitt er, sum fremmandamaðurin uttan iva leggur til merkis, og tað er, at ongastaðni ber til at leiga sær bát. Havi tosað við eiðismenn, heimasandsmenn o.a. Jú, hugskotið er frálíkt, men einki hendir. Ein vágamaður,ið fær sær fatur á fýra-fimm smáum bátum, leigar teir út fyri 100 kr um dagin, hann kemur at vinna pening.

Hatta seinasta var nú eitt persónligt hjartasuff og hevur einki við faldaran hjá Ferðaráðnum at gera.

Samanumtikið kann sigast, at faldarin er góð hjálp hjá stuttleikafiskarum í Føroyum, - serliga hjá fremmandafólki sjálvandi.

Striptease endar í skøkjulevnaði

Kvinnusamskipan Føroya heitir á løgting og landsstýri um at banna striptease í Føroyum

Yvirlýsing frá Kvinnusamskipan Føroya

– Í hinum norðurlondum verður stríðst fyri at steðga skøkjulevnaði, sølu av kvinnum og at steðga pornografi – eisini á alnótini.

Hetta sigur Kvinnusamskipan Føroya, sum hevði ársfund í Vági Dýrabiðidag. Á fundinum var einmælt samtykt at takka Jenisi av Rana, løgtingsmanni, fri at taka málið um striptease upp í løgtinginum.

Royndir úr Íslandi prógva, at striptease endar í skøkjulevnaði.

– Hetta er ikki góð fyrimynd hvørki fyri okkara ungu ella nakran annan, tvørtur ímóti halda vit tað verða sera niðrandi fyri kvinnur.

Vit heita tí á løgting og landsstýri at skipa so fyri, at eingin ivi skal verða um at striptease er bannað í Føroyum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Gransking og hægri útbúgving - MENNINGARÆTLAN

Malan Marnersdóttir
Rektari á Fróðskaparsetri Føroya

Tað fróddi á Fróðskaparsetrinum, at gransking er so ofta nevnd í samgonguskjalinum, og at tað undir Hægri lestur stendur, at "Fróðskaparsetrið skal hava hóskandi umstøður og hava møgu-leikar at geva fleiri útbúgvingar-tilboð."

Fróðskaparsetrið á tveimum beinum

Fróðskaparsetrið hevur júst gjørt eina raðfesta menningarætlan fyri tey komandi tvey árini. Hon byggir á undarfarnar menningarætlanir, sum tað ikki hevur borið til at fremja til fulnar. Henda endurskoðaða menningarætlanin raðfestir økini, soleiðis at løgtingið veit, hvussu játtanin verður nýtt í tann mun hon rokkur longur enn til verandi virksemið. Menningarætlanin hjá setrinum leggur dent á at ganga á tveimum beinum: einum tøkni- og náttúruvísindaligum og einum hug-vísinda- og løgfrøðiligum.

Náttúruvísindi og tøkni

Við øktari játtan til náttúruvísindi og tøkni á Fróðskaparsetrinum hevði grundarlag verið fyri at ment vinnugransking í samstarvi við vinnulívið. Evnisøki fyri vinnuvendar granskingar-verk-ætlanir eru eitt nú í aling, kunningartøkni og biotøkni,ið hava vaksandi týdning fyri virðisøking av rávøruni. Tann almenna játtanin kundi óivað drigið at sær figging frá vinnuni til ávísar verkætlanir.

Hugvísindi og løgfrøði

Hugvísindi eru mál-, bókmenta-, søgu- og samfelagsgransking, sum eisini geva búskaparligt avkast, hóast av øðrum slag. Hugvísindi hava at gera við mentan og trivnað, tað sum ger tað vert at liva her. Øll lond hava tørv á at kenna seg sjálv mentanarliga. Fyri at kunna virða aðrar mentanir og lívið hjá øðrum, er neyðugt at kenna og virða sítt egna.

Raðfestingar

Fremst í raðfestingunum standa gransking og undirvísing í KT og løgfrøði. Síðan koma biotøkni og fjølmiðlan.

Kunningartøkni

Átøk hava verið gjørd fyri at menna KT sum frøðigrein á Fróðskaparsetrinum. Enn vantar fólk við granskingarførleika á økinum, men í samstarvi við útlendsk universitet er eydnast at fáa eina bachelorútbúgving í kunningartøkni í lag. Hetta er eitt stig á leiðini til at menna føroyskan førleika í KT-vinnuni, og uppgávur hjá studentunum verða ofta gjørdar júst í samstarvi við vinnuna. Men tað er greitt, at vísindafólk mugu setast á Fróðskaparsetrinum, um stovnurin skal gagna KT-vinnuni meira.

Løgfrøði

Framkomin samfeløg hava reglur og skipanir fyri neyðini. Eitt tað fyrsta, sum tey gomlu universitetini í Evropa fóru undir, var at granska og undirvísa í løgfrøði. Fróðskaparsetrið hevur tað sama í umbúna, og hesi seinnu árini hevur eitt grundskeið í lóg fingið góða undirtøku. Hugsanin er, at tey, sum lesa løgfrøði uttan fyri Føroyar, skulu kunna taka partar av útbúgvingini á setrinum. Harafturat er ætlanin at skipa eina masterútbúgving at leggja aftur at eini bachelorútbúgving í hóskandi faki.

Hetta fer at verða gjørt í samstarvi við løgfrøðiligar stovnar uttan fyri landoddarnar. Í tí sambandi eru avtalur fingnar við Lærda Háskúlan í Keypmannahavn og Háskóla Íslands.

Biotøkni

Triðja stigið í raðfestingunum tey bæði komandi árini er biotøkni. Biotøkni er vísindagrein, sum m.a. kann fáa nýggjar vørur til vegar. Fróðskaparsetrið ynskir at fáa umstøður til at skipa gransking og hægri útbúgving í biotøkni. Ein bachelor útbúgving í matvørufrøði er skipað. Hon er lýst álitinum "Útbúgvingar innan fiskivinnuna", sum varð latin landsstýrismann-inum í mentamálum í august 2001. Enn er tó ongin játtan komin til hetta fakøkið. Tað er um-ráðandi at útbúgva fólk á hægri stigi á hesum øki, tí tað eru tey, sum skulu vera við til at skapa størri virði burtur úr rávøruni.

Fjølmiðlan

Í dag er fjølmiðlan eins neyðugt og tað var at fáa føroyskt skúla- og kirkjumál í síni tíð.

Miðlanin/samskiftið í útvarpi og sjónvarpi er av øðrum slag málsliga, samskiftisliga, viðvíkjandi tíðarrammu og í aðrar mátar enn bæði tann gamla munnliga mentanin og prentmáls-mentanin. Tað talgilda, skrivliga samskiftið, sum fer fram í dag, brýtur somuleiðis nógv frá teirri klassisku skriftmálsmentanini. Fyri føroyskt samfelag, mál og mentan er tað tí avgerandi at kanna, lýsa, meta og geva frálæru um teir nýggju samskiftisformarnar: ástoðiliga tí tað er partur av gransk-ingini av føroyskum nútíðarmáli og mentan; og praktiskt sum liður í útbúgving av tilvitaðum fjølmiðlafólki við bæriligum, beinraknum máli, alment eins væl og innan fyri alskyns seroki. Fjølmiðlan má takast upp sum granskingar- og undirvísingarevni á Fróðskaparsetrinum.

Menningarætlan givið úrslit

Tað hjálpir og nyttar at seta sær mál í menningarætlanini, tað eru fleiri dømi um á setrinum. Í menningarætlanini frá 1999 varð nevnt, at havfrøðin á setrinum skuldi mennast. Hetta varð gjørt og sjónlig úrslit síggjast eftir hesum, millum annað til stórt gagn hjá útróðrarflota, alivinnu, tilbúgvingarætlan og øðrum. Í dag eru mentir støddfrøðiligir myndlar, sum neyvt kunnu siga, hvussu rákið hevur ávirkan á t.d. eitt oljuútlát. Somu myndlar kunnu eisini hjálpa alivinnuni at siga, hvar skilabest er at leggja nýggj aliøki ella flyta verandi ringar. Harafturat er nú farið undir eina verkætlan, sum við støði í arbeiðinum higartil skal menna nýggja alitøkni til harðbalin øki, ein verkætlan, sum kann koma at hava ómetaliga stóran týdning fyri føroyska alivinnu, sum ekur á sárum knøum

Í somu menningarætlan varð ynski sett fram um at menna kolvetnisfrøði. Tað varð gjørt, og eitt íteøkiligt úrslit er slóðbrótandi Ph.D.-ritgerðin seinasta summar um spenningar í boriholum. Úrslitini eru sera hent hjá oljuvinnuni, tá ið nýggir boribrunnar skulu gerast.

Í samband við at útbúgvingartilboðini eru ment og víðkaði er studentatalið økt munandi, frá 1999 til í dag er talið økt úr 70 upp í 150. Fasta vísindastarvsliðið er økt við 5 granskarum, umframt at seks granskarar á øðrum stovnum eru knýttir at Setrinum í tíðaravmarkaðum parttíðarstørvum.

Loksins er at nevna, at tøkniliga eru stórar íløgur gjørdar í samskiftisamboðini og teldutøkni. Fróðskaparsetrið hevur saman við granskingarstovnunum á Debesartrøð og Landsbókasavninum ment og dagført teldunetið, soleiðis at tað lýkur tey krøv, sum granskarar, fyrisit-arar og almenna tænastustigið seta.

Samanumtikið

Á universitetum verður vitan framleidd við gransking. Undir útbúgvingini heysta tey ungu fruktirnar av granskingini gjøgnum undirvísingina. Gransking og hægri útbúgvingar eru iløgur í framtíðina.

Frálík javnstøðuráðstevna

Kári P. Højgaard
løgtingsmaður

Tað var ein hugaligt at síggja góðu uppmøtingina í Norðurlandahúsinum, mánadagin 10. mai, har Javnstøðunevndin skipaði fyri almennari ráðstevnu við heitinum "Á leiðini til javnstøðu". Ofta eru tað kvinnur, sum leita sær til tiltøk, ið hava við javnstøðu at gera og soleiðis var eisini hesaferð - men nærum ein fjórðingur av luttakarunum vóru menn.

Sjálvstýrisflokkurin hevur boðað frá, at málið til næsta val er at hava eins nógvar kvinnur og menn á vallistunum. Tað tykist, sum um aðrir politikkarar taka okkum táttin upp. Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í javnstøðumálum, hevði eina framløgu, har hann segði seg hava ætlanir um at leggja eitt uppskot til samtyktar fyri tingið um at seta eina nevnd, sum skal arbeiða júst við hesum sama endamálið, at fáa meira javnvág í kynsbýti á løgtingi, soleiðis at hon speglar samfelagið sum heild.

Gitte Larsen frá Copenhagen Institute for Future Studies helt ein fyrilestur. Granskarin helt ikki, at tað hjálpir at skumpa og hála fleiri kvinnur í politikk og leiðandi størv. Ístaðin helt hon, at størvini eiga at broytast. Verður hugt at leiðarastørvum má ásannast, at tað ikki altíð er eitt 9:00 - 16:00 starv, men ofta krevur hetta, at arbeitt verður langt út yvir vanligar arbeiðstíðir. Sum hon so beinrakið segði, so hava kvinnur í slíkum størvum tørv fyri "at ha´ en kone derhjemme".

Nógv góð hugskot kundi ein fáa við at sita og lurta eftir frálíku fyrilestrarhaldarunum, og tað er ringt at taka ein fram um annan. Okkara heimligu kreftir stóðu einki aftanfyri útlendsku gestarøðararnar.

Áhugavert var tað, sum fyrilestrarhaldarin frá Tele Danmark greiddi frá viðvíkjandi teirra politikki, at fáa fleiri kvinnur í leiðandi størv. Hann segði millum annað, at Tele Danmark rætt og slætt ikki hevur ráð til, at lata ein slíkan hóp av góðari kvinnuligari leiðsluorku fara til spillis. Tey nýta ein Talent Pool, har tey hvørt ár dyrka leiðsluevnir. Í byrjanini vóru 21% kvinnur í hesum Talent Pool, men er hetta tal økt og verður skjótt 33%. Hetta kundi verið eitt hugskot til allar politiskar flokkar í Føroyum og sjálvsagt eisini til privata vinnulívið.

Vígdis Finnbogadóttur, livandi fyrimyndin,ið megnaði at gerast fyrsti kvinnuligi forseti, hevði áhugaverdan fyrilestur. Tá hon varð biðin um at stilla upp til forsetavalið í Íslandi fyrstu fer, bar hon seg undan. Tað var eitt langt telegram frá einari trolaramanning, sum fekk hana til at taka stigið og játta. Hendan skipsmanningin, allir menn, heittu á hana um at stilla upp og lovaðu henni sín fulla stuðul. Hon segði seg arbeiða fyri javnstøðu, eisini hjá monnum. Tó helt hon, at menn ikki í so stórum mun sum kvinnur, høvdu hennara hjálp fyri neyðini.

Fremsta kvinnan í føroyskum politikki var Marita Petersen, sáli. Floksfleiagin Vilhelm Johannesen løgtingslimur hevði eina kensluborna og livandi talu um hesa kvinnu, ið hóast stuttan arbeiðsdag megnaði at skriva politiska søgu sum floksleiðari, fyrsti kvinnuligi løgtingsformaður og løgmaður.

Ein onnur kvinna varð nevnd, ið hevur nátt politisku tindarnar og er kend av hvørjum mansbarni í Føroyum. Tað er Lisbeth Petersen, løgtingslimur, ið hevur virkað sum borgarstjóri, floksformaður og fólkatingsumboð. Harumframt hevur hon havt fleiri onnur álitisstørv og slóða fyri, at alt ber til, tá hugurin drívur verkið.

Livandi og sigandi var - sum altíð - fyrilesturin hjá Jógvani Fríðrikssyni, presti. Hann slóg fast við sjey tumma seymi, at javnstøða frá einum kristiligum sjónarhorni er verulig javnstøða. Gud skapti ikki mannin fyrst og síðani kvinnuna. 1.Mós. 1.26. "Vær viljum gera menniskjur eftir okkara mynd". Vers 27, sum kall og konu skapaði han tey. (hatta havi eg ikki hugsa um fyrr)!

Meirilutin av teimum sum høvdu orðið vóru kvinnur, og tær høvdu so sanniliga "orðið í síni makt".

Ráðstevnan bleiv meistaraliga leidd av tíðindakvinnuni Bjørt Samuelsen.

Tað mest positiva við ráðstevnuni var hugburðurin. Tað sum kom fram, var veruleikin, uttan dukan í høvdið av hinum kyninum t. v . s. skeivleikar vóru ávístir, har ein sum luttakari sat eftir við tí kenslu, at her er ein avbjóðing, kvinnur og menn í felag mega taka upp og gera nakað við.

Javnstøðunevndin við Anniku W. Joensen á odda. Tøkk fyri ein stak góðan dag, sum fyri onkran luttakara hevur flutt mørk.